# Foreldrini burtur – 500 fólk í veitslu

Ein tannáringur í Melbourne nýtti høvi at halda ball, ímeðan foreldrini vóru burturstødd. Men tá avtornaði komu fleiri enn 500 fólk, og tað er einki at siga til, at hann misti tamarhaldi fullkomilig. Ùrslitið var, at løgreglan mátti koma á staðið við 30 monnum, hundum umfram eini tyrlu, áðrenn tað eydnaðist teimum at fáa endað ballið. Hetta veit danska BT. Drongurin, ið var vertur, kann vænta sær eina stóra bót frá løgregluni. Hann sigur tó, at um høvi býðst at halda eina slíka veitslu aftur, so verður hann ikki seinur at senda innbjóðingarnar út.



# Framúr góðar umstøður

**Nýbygningarnir hjá Faroe Seafood, Falkur og Heykur, sluppu ikki heilt undan "barnasjúkum". Nú verður arbeitt við at rætta nøkur ting, og síðan verður lagt út á hav við góðum treysti. – Hetta eru sera góð skip, og manningarumstøðurnar eru framúr, sigur skiparin á Falki**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kristjan Karl Eliasen er skipari við øðrum av nýggjastu partrolarunum hjá Faroe Seafood, Falki. Hin trolaran Heyk førir skopuningurin Ásbjørn Kjærbo. Teir hava báðir siglt við Jaspis og Ametyst seinastu árini.

- Eg fór við hesum bátum fyri stívliga sjey árum síðan. Í fyrstani skifti eg ímillum, men síðan gjørdist eg fastur skipari við Ametyst.

## Góð skip

Skiparin sigur, at Falkur og Heykur eru heilt onnur skip enn Jaspis og Ametyst.

- Tey gomlu eru eisini góð skip, men tíðin er líkasum farin frá teimum, um vit samanbera tey við hesi nýggju og stásligu skipini.

Hann heldur eisini, at Falkur og Heykur eru uppaftur betri skip enn Bakur og Stelkur, sum eisini eru bygdir á M.Cies skipasmiðjuni í Vigo í Spaniu.

- Troldekkið er innilokað, og hetta eru eisini breiðari og rúmligari skip. Umstøðurnar hjá manningini eru sera góðar. Hvør maður hevur egið kamar við brúsu, sjónvarpi og sofu. Skipini eru ótrúlig í sjónum, og lítið og einki hoyrist til larm umborð. Øll apeteringin er har frammi, samstundis sum maskinan er har afturi. Tú kanst tosa allastaðni umborð uttan at vera doyvdur av larmi.



## Roynast væl

Kristjan Karl sigur, at á ferðini heim úr Spaniu fingu teir veruliga at síggja, hvussu skipini roynast í sjónum.

- Tað var tvassut veður og stormur ein stóran part av ferðini, og eg kann bara siga, at skipini royndust heilt ótrúliga væl, sigur hann.

Falkur og Heykur hava bæði stabiliseringstangar og slengrikjølar.

- Byggisniðini broytast alla tíðina, og hesir bátarnir hava minni spring í skrokkinum enn eitt nú Bakur og Stelkur. Teir eru beinari. Hvønn týdning tað hevur – ella um tað hevur nakran týdning - dugi eg ikki at siga. Men alt bendir á, at hetta eru ógvuliga rólig skip í sjónum

. Á veg heim úr Spaniu hevði Kristjan Karl konu sína Lis og yngstu dóttrina Rebekku við sær.

Spurdur, um tær ikki høvdu sjóverk á ferðini, sigur hann.

- Sjóverk? Jú, sjálvandi var nakað av sjóverki, men tað hava fleiri av okkum, sum sigla, eisini, tá ið langt er ímillum túrar.

## Barnasjúkur

Falkur og Heykur komu til landið 11. desember, men áðrenn skipini fóru úr Spaniu, vóru tey royndartúr, har útgerðin í ein ávísan mun varð roynd.

Kristjan Karl sigur, at teir á hesum túri ikki fingu røttu myndina av útgerðini, eitt nú tí, at tíðin var so stutt og tí, at dýpið á leiðini, teir royndu, ikki er sum hjá okkum.

- Eftir at skipini komu til landið, fóru vit ein royndartúr 17. desember og vóru inni aftur 18. desember. Síðan varð flotin raktur av verkfalli. Nú hava vit so aftur verið eitt stuttan túr, sum eisini hesaferð vardi í eitt samdøgur.

Skiparin sigur, at nú skipini hava loyst tvær ferðir, er greitt, at Falkur og Heykur hava nakrar "barnasjúkur", sum rættast má upp á, áðrenn verulig gongd kemur á. Talan er um nøkur ting, sum mugu justerast, men hetta eru ikki brek, sum hvørt sær taka so langa tíð.

- Eg vænti kortini, at tað mesta av eini viku gongur, áðrenn vit eru klárir at loysa aftur, leggur hann aftrat.

Í aðrar mátar hava skipini riggað sum ætlað.

## Køla fiskin

Falkur og Heykur hava báðir "trumlu" við køling, sum kølir fiskin niður beint eftir, at hann er kruvdur, og áðrenn hann fer í lastina.

- Hetta er nýtt í okkara verð, og ætlanin við hesum er, at fiskurin skal fara í lastina so góður sum gjørligt. Kølingin skuldi eisini gjørt, at kruvdu fiskurin bløðir betri, soleiðis at minni blóð verður í flakinum, tá ið fiskurin er virk-



*- Nú skulu vit bara fáa loyst barnasjúkurnar, ið altíð kunnu væntast, tá ið skip eru spildurnýggj, og síðan fara vit í gongd, sigur Kristjan Karl Eliasen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*